# Hvør avloysir Ronaldo

Eftir øllum at døma spælir Cristiano Ronaldo við Real Madrid komandi kappingarár, og longu nú gita ensku miðlarnir dúgliga, hvønn spælara Manchester United fer at keypa ístaðin fyri portugisan. Franski Franck Ribery hevur leingi verið nevndur sum ein møguleiki, og í dag verða menn sum Klaas-Jan Huntelaar, Karim Benzema og Zlatan Ibrahimovic nevndir.




# Atletico selur ikki

Hóast fleiri av stóru og ríku ensku feløgunum sýna áhuga fyri eitt nú Diego Forlan, Sergio Agüero og Maxi Rodriguez, so sigur Atletico Madrid, at teir hava ongar sum helst ætlanir um at selja spælararnar. – Vit hava ikki móttikið nakað formligt boð upp á spælararnar, og vit ætla okkum heldur ikki at selja nakran teirra. Líkamikið hvør upphæddin er, sigur Jesus Garcia Pitarch, sum er ítróttarstjóri í felagnum.

# Skuldi havt skorað

**Hóast hansara pláss var á vinstra bakki, fekk Jóhan Troest Davidsen ta einu ferðina í fyrra hálvleiki tað mesta av einum kúfóðri á serbisku hálvuni at renna á. Hann royndi at plasera skotið, men fekk tíverri ikki bóltin fram við serbiska málverjanum**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*




*Følda innarasíðan var ov sjónlig hjá málverjanum, og so fór eisini hesin møguleikin til spillis. Og tað iðraði Johan Troest Davdisen seg um eftir dystin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tá verjuspælarar skora mál, er tað aloftast eftir eitt hornaspark ella aðra deyðbóltsstøðu. Men fyri aðru ferð í tíð síni sum A-landsliðsspælari, fekk Johan Troest Davidsen í gjárkvøldið ein stóran møguleika, ið kom eftir eina støðu, ið spurdist burtur úr góðum spælskili og hegni at renna, tá rennast skal.

Fyrru ferð, Jóhan hevði ein stóran møguleika at skora fyri Føroyar, var í útidystinum ímóti Italia, sum var spældur í Modena tann 21. november í fyrraárið, tá hann í seinna hálvleiki gjørdist púra leysur, men úr stuttari fjarstøðu skallaði á stongina.

Kanska verður tað »alle gode gange tre«, tí tað er ikki sørt óheppið, at í hagtølum hansara stendur 11 dystir og einki mál. Har kundi gott verið ið hvussu er eitt…

– Tað er rættiliga skuffandi at tapa 0-2, tí eg helt, at vit vóru rættiliga væl við í fyrra hálvleiki. Vit kláraðu at koma til fleiri kjansir og enntá stórar kjansir. Sjálvur hevði eg so ein, har eg skuldi havt skorað, ásannaði Johan Troest Davidsen eftir dystin í gjárkvøldið.

### Luftin fór úr

Kjansurin kom miðskeiðis í fyrra hálvleiki. Hóast Jóhan var bakkur og Símun Samuelsen vongur í vinstru síðu, gavst nakrar ferðir pláss fyri renning av bakkinum og allan vegin fram, og í hesum eina førinum gjørdist Jóhan púra leysur í vinstru síðu. Hann royndi at plasera skotið, meðan teir 2.896 á Tórsvølli hildu ondini í spenningi, men Vladimir Stojkovic í serbiska málinum fekk strekt vinstra arm út og vart fyri.

– Sum ikki eina ferð, so vísir tað seg, at tá vit ikki taka av, verður tað nokk so ringt, tá hinir eisini skapa kjansir í hinum endanum. Tað kostaði og luftin fór úr okkum, tá teir fingu seinna málið, segði landsliðsbakkurin.

– Men alt í alt haldi eg, at menn stríddust við øllum, sum teir høvdu. Vit áttu kanska at havt lagt trýst á teir eitt sindur longur frammi á vøllinum eitt sindur fyrri, men hóast allir góvu seg fult út, tað rakk ikki ordiliga hesa ferð.



*Hóast hann iðraði seg um tapið, so fegnaðist Bogi Løkin um, at føroyska landsliðið skapti so nógvar vandastøður, sum liðið gjørdi í gjár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Málini koma

**– Tað er positivt, at vit skapa kjansir, segði Bogi Løkin eftir dystin ímóti Serbia í gjárkvøldið, har hann spældi allar 90 minuttirnar úti í høgru síðu á miðvøllinum**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Um nakar, so veit Bogi Løkin, hvat tað vil siga at skora mál á føroyska landsliðnum, tí hann skoraði sjálvur síðsta málið hjá føroyska A-landsliðnum í einum undankappingardysti. Tað var, tá hann 11. oktober í fjør legði Føroyar á odda 1-0 í dystinum ímóti Eysturríki, sum forrestin endaði við javnleiki, 1-1.

Eftir dystin í gjárkvøldið, tá Føroyar á Tórsvølli taptu 0-2 fyri Serbia, sá hann ikki so svart upp á tað, hóast tað ikki eydnaðist at fáa nakað mál burtur úr teimum møguleikunum, føroyska liðið fekk skapt sær.

– At vit einki mál fingu, skyldaðist fyrst og fremst vantandi neyvleika. Men vit vóru eisini eitt sindur óhepnir í nøkrum støðum, har vit vóru líka við at koma ígjøgnum, segði Bogi.

– Tað, at vit skapa kjansir, er tó positivt, so málini koma kanska í komandi dystunum, tá tey nú ikki komu í dag. Serliga í fyrra hálvleiki skapa vit nógvar kjansir, og tað er eisini altíð tað, vit fara eftir. Og tað kláraðu vit nú rímiliga væl.

Eins og hinir á føroyska liðnum, var uttasti høgri maðurin á føroyska miðvøllinum tó vónbrotin av, at tað ikki skuldi eydnast at fáa meira burturúr. Men í sama andadrátti minti hann bæði seg sjálvan og okkum onnur á, at tað velst eisini um mótstøðuliðið:

– Vit eru skuffaðir, tí tú verður altíð skuffaður av at tapa. Serbia er sjálvandi eitt gott lið, men hóast tað, so eru vit ikki nøgdir við at tapa, staðfesti Bogi Løkin, sum spældi sín sjeynda dyst á landsliðnum, har hann eisini eigur tað eina málið.

# Sparkaðu ov nógv

**– Hetta var eitt øgiliga gott lið, vit spældu ímóti, staðfesti føroyski málverjin, Jákup Mikkelsen, sum tvær ferðir noyddist í málið eftir bóltinum, men sanniliga eisini hevði fleiri avgerandi bjargingar, tá harðast leikaði á**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*



*Enn eina ferð spældi Jákup Mikkelsen ein branddyst í føroyska málinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Við sínum 62 landsdystum, er Jákup Mikkelsen nógv tann royndasti av núverandi spælarum á føroyska A-landsliðnum. Og tá hann eitt gott korter inn í seinna hálvleik noyddist í málið eftir bóltinum fyri aðru ferð í gjárkvøldið, var tað mál nummar 141, sum var farið ígjøgnum hjá honum.

Tað sigur tó meira um føroysku landsliðssøguna og gongdina í teimum flestu dystunum, enn tað sigur um Jákup, tí enn eina ferð greiddi hann úr hondum eitt avrik, hann saktans kann liva við. Enn eina ferð hevði hann fleiri avgerandi bjargingar, tá harðast leikaði á.

– Vit mugu bara ásanna, at tað var eitt øgiliga gott lið, vit spældu ímóti, og serbarnir eru ringir at halda burtur frá kjansunum, segði málverjin.

– At teir so fáa mál beint fyri hálvleik, ger tað trupult fyri okkum. Høvdu vit fingið hildið nullið til hálvleiks, trúgvi eg, at vit kundu fingið meira burturúr. Men eg eri væl nøgdur við liðavrikið.

Jákup Mikkelsen sigur, at teir enn hava havt øgiliga lítla tíð saman við nýggja landsliðsvenjaranum, Brian Kerr, men at teir tó til fulnar hava skilt, hvussu hann ynskir, at føroyska landsliðið skal spæla.

– Hann vil hava okkum at spæla longur frammi á vøllinum. Tað riggaði eisini nøkulunda, tí vit møttu teimum heilt frammi, sigur Jákup.

– Hinvegin haldi eg, at vit brúktu ov lítið av tíð uppá at spæla og heldur sparkaðu ov nógv. Vit royndu at finna avgerandi sendingina alla tíðina, heldur enn at spæla runt.